Føroyska Bíbliufelagið



Kirkjuárið 2020-21

# BÍBLIULESIÆTLANIN

***Soleiðis gert tú:***
Út fyri hvønn dag í árinum finnur tú eitt skriftstað sum til dømis Jóh 5,1-18 (Jóhannesevangeliið kapittul 5, ørindini 1-18.) Slá upp í tínari Bíbliu og les alt tekstbrotið til dagin. Aftast í Bíbliulesiætlanini finnur tú listan yvir styttingarnar.

**Bíbliulesiætlanin**
Útgevari: Føroyska Bíbliufelagið
Lesiætlan og tematekstir: Lars Ole Gjesing
Ritstjórn: Mathias Anker Kure
Permumynd Gunnar K. Nattestad.
Myndir: Jóngerð Mikkelsen og Gunnar K. Nattestad
Grafikkur: Ann Degen
Týðing og rættlestur: Hjørleif Poulsen og Henrietta Arge Jacobsen
Uppseting og prent: Føroyaprent

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# Tær høgu tíðirnar!

Tá Gud skapti himmal og jørð, skapti hann eisini ymsar tíðir og høvið. Hann gjørdi skilnað millum dag og nátt, millum gerandis og heilagt. Hesum stevi fylgja vit enn í dag, hóast skilnaðurin er vorðin nakað kámari seinastu árini, har vit hava trupult við at seta tíð av til hvílu. M.a. miðlar og handilslív gera minni mun á degi og nátt, og vit nærkast so-kallaða 24/7 – samfelagnum, har alt skal bera til alla tíðina. Tað er sum hava vit gloymt, at hvíld er ein tíðandi partur av stevinum.

Í kalendaranum eru høgtíðir og halgidagar. Tey mynda stevið í kirkju-árinum, við advent og jólum, páskum og hvítusunnu. Høgtíðirnar eru høgar tíðir. Tað eru tíðir og dagar, ið hevja seg upp um tann dagliga meldurin. Um vit siga, at tað gerandisliga er vatnrætt, so eru høgtíðirnar loddrættar. Tað er tað himmalvenda, sum ger munin. Vit hyggja upp um tað dagliga og loyva Gudi framat: „Hann okkum skapaði, og hansara vit eru, hans fólk og tað fylgið, hann røktar.“ sigur skaldið í Sálmi 100,3. Kirkjufaðirin Augustin skrivar eisini soleiðis: „Harri, tú hevur skapt okkum til tín. Okkara hjørtu kunna ikki hvíla, fyrr enn vit hvíla í tær“.

Øll hjørtu hava tørv á stevi og kós. Og tað er júst tað, sum dagligur bíbliulestur gevur - stev og kós. Ein løta í Bíbliuni, er høvið til umhugsan, undran og eftimeting. Hvíldin kemur sera sjálvdan av sær sjálvum. Tað ger vanin heldur ikki; tað er nakað vit skula venja okkum til. Men, við at lesa og sodna Guds orð, fáa vit altíð føði í tøkum tíma. Ein skatt við livandi orðum, søgum og bønum, ið hava ævigan týdning.

Bíbliulesiætlanin 2020-21, hevur lestrar eftir fyrru tekstarøð til hvønn sunnudag. Hesafer er lesturin til hinar dagarnar í vikuni, serliga ætlaður at geva størri dýpd til lesturin sunnudag. At lesa dagliga í Bíbliuni, letur okkum í til at fylgja stevinum í kirkjuárinum og at taka lut – við orðum til hvílu og til virksemi, lívsdirvi og troyst.

Lat okkum halda fast við tað livandi orðið!
Gunnar K. Nattestad, aðalskrivari.

leysliga umsett eftir Birgitte Stoklund Larsen.
Aðalskrivara í Danska Bíbliufelagnum.

# Advent

Adventstíðin er fyrireikingartíð til jólahaldið, og samstundis byrjar kirkjuárið her: fjórða sunnudag fyri jóladag. Sjálvt orðið advent er gamal málburður úr latínskari tíð, sum kirkjan síðan hevur tikið til sín. Orðið merkir koma, og tað er ein ógvuliga hóskandi yvirskrift, tá ið jólini jú eru at hátíðarhalda Jesu komu í heimin sum nýføðingur.

Men verður hugt nærri at teimum bíbliutekstum, sum verða lisnir í kirkjunum í adventstíðini, so vísir tað seg skjótt, at teir hava eitt nógv breiðari úrval av evnum um „komu“ enn bert føðing barnsins. Tað gerst greitt, at evnið hevur greiningar út í alla bíbliusøguna, har vónin um, at nakað heilt nýtt og uggandi fer at koma í heimin, er grundleggjandi og afturvendandi.

Soleiðis eru allir tekstirnir til 2. sunnudag í advent miðsavnaðir um Jesu afturkomu til jarðar, komu menniskjusonarins á himmalsins skýggjum. Tí frásagnirnar um Jesu deyða og uppreisn og himmalsferð eru ikki um, at alt hareftir aftur er sum vant, sum tað var áðrenn hansara virksemi. Tann avgerandi nýggi kunnleikin um Guds kærleika er komin í heimin við Jesusi, og tað skal verða fortalt og breitt út til trúgv, vón og kærleika, inntil Jesu afturkomu.

Í Gamla Testamenti er evnið „koma“ ella „tann, sum koma skal“ nógvastaðni at finna hjá fleiri profetum. Í trongdartíðum og undir álopi av fremmandum maktum hava teir boðað, at Gud Harrin framhaldandi ikki fer at venda andlitinum burtur, men fer at grípa inn og bjarga Ísrael. Ofta hevur hendan vónin verið orðað í lyftum um ein nýggjan, sterkan Ísraels kong, tann salvaða, Messias, sum fer at koma við Guds mátti og rekur fíggindan út og setir eitt friðarríki á stovn. Tað grundleggjandi í evangeliunum í Nýggja Testamenti og brøvunum er boðanin um, at Jesus úr Nasaret er hesin kongur, sum kemur. Kristus er tað grikska orðið fyri Messias. Men samstundis broytist tankin um tann, sum tey vænta. Nýggja Testamenti lýsir ikki Jesus sum ein krígskong við valdi og makt, men tvørturímóti sum tann spaklynta, fyrigevandi, miskunnsama, sum er komin fyri at lata Guds kærleika til heimin í hold. Tað er høvuðsevnið í adventstíðini.

# NOVEMBER - DESEMBER

| | |
|---|---|
| Sunnudagur 29. | 1. s. í advent // **Matt 12,1-9** |
| Mánadagur 30. | **1 Mós 9,9-17** // Boga mín seti eg í skýggið |
| Týsdagur 1. | **Sl 119,81-96** // Nær vilt tú døma mínar øvundarmenn? |
| Mikudagur 2. | **Jes 13,9-16** // Harrans øgiligi dagur kemur við bræði og brennandi vreiði |
| Hósdagur 3. | **1 Tess 4,13-5,11** // Allir eru tit børn ljósins |
| Fríggjadagur 4. | **1 Pæt 1,3-9** // Hann hevur endurføtt okkum til livandi vónar |
| Leygardagur 5. | **Opb 21,1-8** // Sí, eg geri allar lutir nýggjar |
| Sunnudagur 6. | 2. s. í advent // **Luk 21,25-36** |
| Mánadagur 7. | **Sl 27,7-14** // Kunnan ger mær, Harri, veg tín |
| Týsdagur 8. | **Sl 146,1-10** // Harrin reisir upp tey niðurboygdu |
| Mikudagur 9. | **Jes 42,1-9** // Sí tænari mín |
| Hósdagur 10. | **Mal 2,17-3,4** // Hann skal greiða vegin undan mær |
| Fríggjadagur 11. | **Mal 3,20-24** // Sí, eg sendi tykkum Elia profet |
| Leygardagur 12. | **Matt 11,11-19** // So er hann Elia, ið koma skal |
| Sunnudagur 13. | 3. s. í. advent // **Matt 11,2-10** |
| Mánadagur 14. | **5 Mós 18,14-22** // Gud man vekja upp profet, tílíkan sum meg |
| Týsdagur 15. | **Jes 40,1-8** // Greiðið gøtu Harrans |
| Mikudagur 16. | **Luk 1,57-66** // Jóhannes skal hann eita |
| Hósdagur 17. | **Luk 1,67-80** // Tú skalt ganga undan fyri ásjón Harrans |
| Fríggjadagur 18. | **Joh 1,29-34** // Sí, Guds lambið |
| Leygardagur 19. | **Opb 5,1-10** // Verdur ert tú at taka bókina |
| Sunnudagur 20. | 4. s. í advent // **Joh 1,19-28** |
| Mánadagur 21. | **2 Mós 13,1-2** og **11-16** // Tú skalt ogna Harranum alt, sum opnar móðurlív |
| Týsdagur 22. | **Jes 8,12-18** // Og hann skal vera snávingarsteinur |
| Mikudagur 23. | **1 Pæt 2,1-10** // Komið til hansara, hin livandi steinin |
| Hósdagur 24. | Jólaaftan // **Luk 2,1-14** eller **Matt 1,18-25** |
| Fríggjadagur 25. | Jóladagur // **Luk 2,1-14** |
| Leygardagur 26. | 2. Jóladagur // **Matt 23,34-39** |
| Sunnudagur 27. | Sunnudagur millum jóla og nýggjárs // **Luk 2,25-40** |
| Mánadagur 28. | **4 Mós 24,10-19** // Stjørna rennur upp av Jákupi |
| Týsdagur 29. | **Jes 2,1-5** // Hagar skulu allir heidningar tysja |
| Mikudagur 30. | **Jes 66,18-24** // Tá skulu tey koma og síggja dýrd mína |
| Hósdagur 31. | **Mika 5,1-8** // Hann skal vera friður |

# Jól og trettandi

Føðingardagar fylla ikki nógv í Bíbliuni, og føðingardagar hjá smáfólki eru als ikki nevndir. Í veruleikanum eru bara tveir føðingardagar nevndir í allari bíbliusøguni – báðir kongaligir. Í 1 Mós. 40,20 verður stutt nevnt, at Farao kongur í Egyptalandi hevur føðingardag og heldur tí veitslu, og í Mark 6,21-28 verður greitt frá Heródesi kongi, har føðingardagshaldið verður Jóhannesi Doypara at bana.

Tá kirkjan kendi, at tíðin var búgvin at halda Jesu føðingardag, varð miðvetur valdur til hátíðarhaldið, har ljósið vann fram, og har veitsla var frammanundan í Rómverjaríkinum.

Tær bíbilsku frásagnirnar um Jesu føðing og barnaár eru savnaðar í fyrstu kapitlunum hjá Matteusi og Lukasi. Hinir báðir evangelistarnir – Markus og Jóhannes – byrja sínar frásagnir um Jesus, har hann sum vaksin kemur til Jóhannes Doypara.

Fleiri av føðingar- og barnasøgunum, sum eru hjá Matteusi og Lukasi, eru prædikutekstir í jólatíðini. Týðandi munur er á, hvussu evangelistarnir hava greitt frá hendingunum. Lukas fortelur gongdina fram til Jesu føðing skiftandi við gongdina fram til føðing Jóhannes Doyparans, og tað er sermerkt, at frásøgnin er fortald við Mariu sum miðpunkti og úr hennara sjónarhorni. Matteus hevur ístaðin Jósef sum høvuðspersón, og hann verður av einglum vegleiddur frá tilburði til tilburð, sum koma fram í dreymum.

Vísmenninir á trettandu – mótsett tí, sum mong kanska halda – eru ikki beinleiðis við í bíbliusøguni. Matteus sigur fyrst í 2. kapittuli frá nøkrum vísmonnum úr Eysturlondum, sum koma við gávum fyri at heiðra tað nýfødda barnið. Heródes kongur roynir uttan úrslit at fáa teir at avdúka tilhaldið hjá barninum. Tað er ein framúr frásøgn, og pentað hevur verið upp á hana í fleiri øldir: Vísmenninir eru vorðnir kongar, sum enntá skuldu umboða hvør sín heimspart.

Tal teirra er sett til trý - sum helst sipar til, at Matteus nevnir tríggjar gávur: gull, roykilsi og myrru. At enda hava kongarnir enntá fingið nøvn: Kaspar, Melkior og Baltasar. Tað týdningarmesta hjá Matteusi við hesari frásøgnini hevur uttan iva verið at vísa, at tann Jesus, sum varð vrakaður og atsøktur av sínum egnu, varð góðkendur av fremmandum fólkasløgum.

# JANUAR

| | |
|---|---|
| Fríggjadagur 1. | Nýggjársdagur // **Luk 2,21** |
| Leygardagur 2. | **Róm 10,12-21** // Hin sami er harri hjá øllum |
| Sunnudagur 3. | Trettandi // **Matt 2,1-12** |
| Mánadagur 4. | **5 Mós 16,1-7** // Á tí staði, sum Harrin, Gud tín, velur sær |
| Týsdagur 5. | **Sl 26,1-12** // Harri, skýlið í tínum húsi eg elski |
| Mikudagur 6. | **Sl 84,1-13** // Sælir eru teir, sum í húsi tínum búgva |
| Hósdagur 7. | **2 Kor 5,1-10** // Meðan vit eru heima í likaminum, eru vit burtur frá Harranum |
| Fríggjadagur 8. | **Fil 2,5-11** // Hann tók á seg tænara mynd |
| Leygardagur 9. | **Hebr 10,1-10** // Sí, eg eri komin til at gera vilja tín, Gud |
| Sunnudagur 10. | 1. s. e. trettanda // **Luk 2,41-52** ella **Mark 10,13-16** |
| Mánadagur 11. | **Hás 1,15-2,7** // Hvør ert tú føgur, vina mín |
| Týsdagur 12. | **Mark 7,1-13** // Reinsan av bikarum og konnum |
| Mikudagur 13. | **Mark 7,14-23** // Einki er uttan fyri menniskjuna, sum kann gera hana óreina |
| Hósdagur 14. | **Jóh 13,1-15** // Tit eru ikki allir reinir |
| Fríggjadagur 15. | **Ef 5,21-33** // Kristus elskar kirkjuna |
| Leygardagur 16. | **Hebr 3,1-6** // Nógv størri dýrd enn Móses |
| Sunnudagur 17. | 2. s. e. trettanda // **Joh 2,1-11** |
| Mánadagur 18. | **2 Mós 3,1-10** // Hann ræddist at síggja Gud |
| Týsdagur 19. | **2 Mós 24,9-18** // Kom niðan á fjallið til mín |
| Mikudagur 20. | **2 Mós 34,1-9** // Tá steig Harrin oman í skýgginum |
| Hósdagur 21. | **Mark 14,32-42** // Tó ikki sum eg vil |
| Fríggjadagur 22. | **2 Pæt 1,12-21** // Og hesa rødd hoyrdu vit sjálvir |
| Leygardagur 23. | **Opb 1,9-20** // Sum ljóð av mongum vøtnum |
| Sunnudagur 24. | Síðsti s. e. trettanda // **Matt 17,1-9** |
| Mánadagur 25. | **Job 7,1-16** // Kvølfullar nætur vórðu lutur mín |
| Týsdagur 26. | **Præd 4,1-6** // Tað flutu tár frá teimum, sum kúgað vórðu |
| Mikudagur 27. | **Róm 2,1-11** // Hann sum skal gjalda einum og hvørjum eftir gerningum hansara |
| Hósdagur 28. | **Róm 9,19-26** // Og til slík hevur hann eisini kallað okkum |
| Fríggjadagur 29. | **1 Kor 1,26-31** // Tað, sum heimurin heldur veikt |
| Leygardagur 30. | **1 Kor 12,14-26** // Tí ringara størri æru |
| Sunnudagur 31. | Septuagesima // **Matt 20,1-16** |



# Føsta

At fasta er tað øvuta av at „festa“ (halda veitslu). Har veitslan merkir gleði og takksemi, merkir føstan sorg og angur og tænir hartil ofta sum eitt amboð til andaliga djúphugsan. Á veitsludøgum, har sabbattin hoyrir undir, er føsta útilokað. Tí eru sunnudagarnir í føstutíðini heldur ikki við í teimum fjøruti føstudøgunum í kirkjuárinum. Sambært Markusarevangeliinum verður funnist at Jesu lærusveinum fyri ikki at halda føstusiðirnar, men Jesus svarar, at hendan tíðin, sum hann er saman við lærusveinunum, er ein veitsla, sum útilokar føstu (Markusarevangeliið 2,18-20).

Í roynd og veru kann føstan verða hildin á mongum ymiskum fráhaldsstigum. Í bíbilska og kristna heiminum hevur ein føstudagur oftast verið ein dagur uttan kjøt og vín og við kynsligum fráhaldi og við at spekja holdið á ymiskan hátt.

Í Gamla Testamenti er bert ein felags, árligur føstudagur ásettur. Tað er sáttardagurin – har fólksins syndir verða strikaðar við halgisiðum í templinum í Jerusalem. Men hartil kundi verða boðið til føstu, tá kongur doyði, við ósigri í bardaga ella øðrum vanlukkum, og hvør einsæris kundi fasta við deyða og sjúku. Á Jesu døgum var vanligt millum gudsóttandi jødar at fasta tveir dagar um vikuna – mánadag og hósdag – og sambært Ápostlasøguni 13,1-3 var føsta eisini í kristnum meinigheitum.

Sum allir aðrir halgisiðir er føstan støðugt hótt av tí bert at sita uttaná og at verða eitt amboð at sýna fram gudrøkni. Fleiri profetar brigda ísraelsfólki fyri hendan vánaliga atburð. Serliga Jesaja profetur átalar harðliga ta føstu, sum er at hanga við høvdinum sum eitt sev og at liggja í posa og øsku: „Nei, føsta, sum mær líkar, er at loysa leinkjur gudloysis og slíta bond oksans, sleppa kúgaðum leysum og sorla hvørt eitt ok, at býta sítt breyð sundur til svong...“ Jes. 58,6-7.

Í Fjallataluni viðger Jesus hesa fellu við føstu: Tann, sum fastar, skal ikki sýna seg fram við døprum og ókenniligum andlitsbrái, „Men tú, tá ið tú heldur føstu, tá salva høvur títt og tváa andlit títt, at tú ikki skalt vísa teg fastandi fyri monnum, men fyri faðir tínum, sum er í loyndum; og faðir tín, sum sær í loyndum, skal gjalda tær.“ Matt. 6,17-18. Vert er at hava í huga, at Jesus er vitandi um, at føsta verður hildin.

# FEBRUAR

| | |
|---|---|
| Mánadagur 1. | **Jes 6,8-13** // Lurtið væl eftir, tit skulu tó einki fata |
| Týsdagur 2. | **Jóh 12,37-50** // Harri, hvør trúði tí, sum hann hoyrdi av okkum? |
| Mikudagur 3. | **Áps 28,23-31** // Guds frelsa |
| Hósdagur 4. | **1 Kor 3,1-9** // Guds akurlendi eru tit |
| Fríggjadagur 5. | **Hebr 5,11-6,8** // Tit eru vorðnir trekir at hoyra |
| Leygardagur 6. | **1 Pæt 4,12-19** // Tit skulu heldur gleða tykkum í sama muni, sum tit hava lut í líðingum Krists |
| Sunnudagur 7. | Seksagesima // **Luk 8,4-15** |
| Mánadagur 8. | **2 Sám 7,8-17** // Hann skal verða mær sonur |
| Týsdagur 9. | **Sl 89,20-38** // Eg kjósi mær hann til ein fyrstaføddan |
| Mikudagur 10. | **Gal 4,1-11** // Gud hevur sent anda sonar síns |
| Hósdagur 11. | **Kol 1,12-23** // Og hann er mynd hins ósjónliga Guds |
| Fríggjadagur 12. | **Hebr 1,1-14** // Set teg við høgru hond mína |
| Leygardagur 13. | **Hebr 5,1-10** // Sonur mín ert tú, í dag havi eg føtt teg |
| Sunnudagur 14. | Sunnudagur í føstuinngangi // **Matt 3,13-17** |
| Mánadagur 15. | **4 Mós 14,27-35** // Tit skulu reika í fjøruti ár í oyðimørkini |
| Týsdagur 16. | **5 Mós 6,4-19** // Tit mega ikki freista Harran, Gud tykkara |
| Mikudagur 17. | **1 Kong 19,1-8** // Hann helt áfram í fjøruti dagar og fjøruti nætur |
| Hósdagur 18. | **1 Kong 19,9-18** // Eg brenni av vandlæti |
| Fríggjadagur 19. | **Sl 91,1-16** // Á hondum skulu teir teg bera |
| Leygardagur 20. | **Opb 20,1-10** // Djevulin, sum vilti teir, varð kastaður í eld- og svávulsjógvin |
| Sunnudagur 21. | 1. s. í føstu // **Matt 4,1-11** |
| Mánadagur 22. | **5 Mós 7,1-11** // Tú skalt ikki eira teimum |
| Týsdagur 23. | **Róm 3,21-31** // Eingin munur er |
| Mikudagur 24. | **Róm 9,1-18** // Eg vil miskunna tí, sum eg miskunni |
| Hósdagur 25. | **Róm 11,1-10** // Gud hevur ikki rikið fólk sítt frá sær |
| Fríggjadagur 26. | **Róm 11,11-24** // Men við falli teirra er frelsan komin til heidningarnar |
| Leygardagur 27. | **Ef 3,1-13** // Heidningarnir eru samarvingar |
| Sunnudagur 28. | 2. s. í føstu // **Matt 15,21-28** |

# MARS

| | |
|---|---|
| Mánadagur 1. | **2 Kong 1,1-8** // Farið og leitið ráð við Báal-Sebub, gudin í Ekron |
| Týsdagur 2. | **1 Kor 10,14-22** // Samfelag við hinar illu andarnar |
| Mikudagur 3. | **1 Kor 12,1-11** // Eingin, sum talar av Guds anda, sigur: „Bannaður er Jesus!“ |
| Hósdagur 4. | **Ef 6,10-20** // Standa ímót sniðlopum djevulsins |
| Fríggjadagur 5. | **Kol 2,6-15** // Hann avvápnaði valdini og harradømini |
| Leygardagur 6. | **Hebr 2,1-9** // Gud vitnaði bæði við teknum og undrum og ymsum kraftargerðum |
| Sunnudagur 7. | 3. s. í føstu // **Luk 11,14-28** |
| Mánadagur 8. | **2 Mós 16,1-8** // Sí, eg vil lata regna breyð av himni |
| Týsdagur 9. | **2 Mós 16,9-21** // Hetta er tað breyðið, sum Harrin gevur |
| Mikudagur 10. | **2 Mós 16,22-31** // Ísraelsmenn nevndu tað manna |
| Hósdagur 11. | **2 Kong 4,38-44** // Teir skulu eta og leiva |
| Fríggjadagur 12. | **Sl 145,8-21** // Tú mettar alt, sum livir |
| Leygardagur 13. | **Jóh 6,51-58** // Eg eri hitt livandi breyðið |
| Sunnudagur 14. | Miðføstu Sunnudagur // **Jóh 6,1-15** |
| Mánadagur 15. | **Dóm 13,1-7** // Tú skalt verða við barn |
| Týsdagur 16. | **Dóm 13,8-18** // Hvussu eiga vit tá at fara at við sveininum? |
| Mikudagur 17. | **Dóm 13,19-25** // Tað hevði verið eingil Harrans |
| Hósdagur 18. | **1 Sám 1,1-8** // Harrin hevði lokað móðurlív hennara |
| Fríggjadagur 19. | **1 Sám 1,9-20** // Hon varð við barn og átti son |
| Leygardagur 20. | **Sl 113,1-9** // Syngið lov, tit tænarar Harrans |
| Sunnudagur 21. | Boðanardagur Mariu // **Luk 1,26-38** |
| Mánadagur 22. | **Sl 20,1-10** // Harrin vil frelsa sín salvaða kong |
| Týsdagur 23. | **Sl 72,1-11** // Tá munnu fjøllini bera fólkinum eydnu |
| Mikudagur 24. | **Sl 72,12-19** // Frá valdi og meini |
| Hósdagur 25. | **Sl 118,19-29** // Hetta er dagurin, ið Harrin hevur gjørt |
| Fríggjadagur 26. | **Es 2,1-5** // Eingin venja seg til orrustu |
| Leygardagur 27. | **Es 62,1-7** // Rætt tín skulu tjóðirnar skoða |
| Sunnudagur 28. | Pálmasunnudagur // **Matt 21,1-9** |
| Mánadagur 29. | **Sl 18,1-13** // Deyðans reip komu á meg |
| Týsdagur 30. | **Sl 18,14-28** // Hann rættir sína hond frá tí høga, meg grípur |
| Mikudagur 31. | **Jes 53,7-12** // Fyri sálarmøði sína skal hann fáa tað at síggja |



# Páskir

Stóra páskafrásøgnin í Gamla Testamenti stendur í 2. Mós 12. Í kapitlunum frammanundan verður greitt frá trælalívinum hjá ísraelsfólki í Egyptalandi og teimum níggju plágunum, sum Gud Harrin við Mósesi sum millummanni sendir yvir Egyptaland fyri at fáa Farao at loyva ísraelsfólki at fara úr landinum. Men Farao hevur hert seg. Tí má ein tíggjunda og avgerandi plága koma afturat. Ein plága, sum er, at oyðarin fer um landið og tekur fyrstafødda í hvørjum húsi egypta av lívi.

Fyri at verja seg móti oyðaranum skal ísraelsfólk taka eitt lamb ella eitt geitarlamb og slátra tað. Tey skulu smyrja nakað av blóðinum á durastólparnar. So fer oyðarin framvið. Síðan skulu tey steikja djórið heilt og eta tað saman við ósúrgaðum breyði. Tað skal gerast í skundi, og tey skulu vera skødd um føturnar, so tey eru til reiðar at fara úr landinum, tá Farao gevur boðini. Hesa páskamáltíð og teir fylgjandi dagarnar við ósúrgaðum breyði skal ísraelsfólk árliga hátíðarhalda til minnis um, at deyðin fór framvið, og um, at Harrin fríaði tey úr trælahaldinum í Egyptalandi.

Páskirnar og veitsla hinna ósurgaðu breyða varð á Jesu døgum hátíðarhildin sum ein pílagrímsveitsla, har eitt ótal av jødum úr innlandinum og úr útlondum savnaðust í Jerúsalem. Eisini Jesus og hansara lærusveinar fara á páskum niðan til Jerúsalem, og tað verða páskadagarnir, sum mynda teir síðstu dagarnar í Jesu lívi, hansara handtøku, dómssøgn, avrætting, jarðarferð og uppreisn.

Teir tríggir fyrstu evangelistarnir siga frá, at tann síðsta máltíðin, sum Jesus át saman við sínum lærusveinum, var júst páskamáltíðin, og at hann tulkar breyðið og vínið sum vísandi til sín komandi deyða og áleggur lærusveinunum at gera tað sama, tá ið teir eftirsíðan koma saman. Sum hesir evangelistarnir greiða frá gongdini, verður hendan máltíðin hildin tveir dagar fyri sabbattina, sostatt hóskvøld. Um náttina verður Jesus handtikin og avhoyrdur, dømdur og krossfestur fríggjamorgun og jarðaður seint seinnapart fríggjadag. Leygardag er hvílu- og halgidagur (sabbat), men tíðliga sunnumorgun fara nakrar kvinnur, sum høvdu fylgst við Jesusi, út til grøvina. Tær finna hana tóma, og ein eingil sigur við tær, at hin krossfesti er risin upp.

Tað er hendan neyva røðin av hendingum, sum gjørdist tað nýggja kristna innihaldið í páskahátíðarhaldinum, og tað er uppreisnar sunnudagsmorgun, sum gevur teimum kristnu høvi at savnast hvønn sunnudag.

# APRÍL

| | |
|---|---|
| Hósdagur 1. | Skírhósdagur // **Matt 29,17-30** |
| Fríggjadagur 2. | Langi fríggjadagur // **Matt 27,31-56** ella **Mark Mark 15,30-39** |
| Leygardagur 3. | **1 Kor 15,12-28** // Men nú er Kristus risin upp frá deyðum |
| Sunnudagur 4. | Páskadagur // **Mark 16,1-8** |
| Mánadagur 5. | 2. páskadagur // **Luk 24,13-35** |
| Týsdagur 6. | **Róm 8,1-8** // Trá andans er lív og friður |
| Mikudagur 7. | **Róm 8,9-17** // Tit fingu sonarættaranda |
| Hósdagur 8. | **1 Kor 15,1-11** // Hann varð sæddur av Kefasi |
| Fríggjadagur 9. | **1 Jóh 1,1-10** // Tað, sum vit hava sæð og hoyrt, boða vit eisini tykkum |
| Leygardagur 10. | **1 Jóh 4,1-6** // Og ein og hvør andi, sum ikki viðkennir sær Jesus, er ikki frá Gudi |
| Sunnudagur 11. | 1. s. e. páskir // **Jóh 20,19-31** |
| Mánadagur 12. | **1 Sám 16,4-13** // Hann goymir at smalum |
| Týsdagur 13. | **Sl 23,1-6** // Harrin er hirði mín |
| Mikudagur 14. | **Ez 34,1-16** // Vei hirðum Ísraels, ið røkta seg sjálvar |
| Hósdagur 15. | **Ez 34,17-31** // Eg skal skipa einans hirða yvir teir |
| Fríggjadagur 16. | **Jóh 10,1-10** // Eg eri dyrnar hjá seyðunum |
| Leygardagur 17. | **1 Pæt 5,1-7** // Røktið tað Guds fylgið, sum er hjá tykkum |
| Sunnudagur 18. | 2. s. e. páskir // **Jóh 10,11-16** |
| Mánadagur 19. | **Jes 40,1-8** // Troystið, troystið fólk mítt |
| Týsdagur 20. | **Jes 66,7-14** // Tit mega súgva av hugsvalandi barmi hennara og mettast |
| Mikudagur 21. | **Áps 1,1-8** // Bíða eftir fyrijáttan faðirsins |
| Hósdagur 22. | **1 Tess 5,1-11** // Sum tjóvur á nátt |
| Fríggjadagur 23. | **Tit 3,3-11** // Í vón verða arvingar |
| Leygardagur 24. | **Opb 21,22-22,5** // Og teir skulu síggja ásjón hansara |
| Sunnudagur 25. | 3. s. e. páskir // **Jóh 16,16-22** |
| Mánadagur 26. | **Jóel 3,1-5** // Úthella av anda mínum |
| Týsdagur 27. | **Jóh 7,32-39** // Er nakar tystur, tá komi hann til mín |
| Mikudagur 28. | **Áps 10,34-48** // Fell heilagur andi yvir øll tey, sum hoyrdu orðið |
| Hósdagur 29. | **1 Kor 2,6-16** // Andin rannsakar alt |
| Fríggjadagur 30. | Dýri biðidagur /// **Matt 3,1-10** |

# MAI

| | |
|---|---|
| Leygardagur 1. | **1 Jóh 5,6-12** // Andin og vatnið og blóðið |
| Sunnudagur 2. | 4. s. e. páskir // **Joh 16,5-15** |
| Mánadagur 3. | **1 Kong 8,22-30** // Snúgv tær nú, Harri, Gud mín, at bøn tænara tíns |
| Týsdagur 4. | **Sl 86,1-17** // Á neyðardegi eg rópi til tín |
| Mikudagur 5. | **Sl 102,1-14** // Ein bøn av einum armum, tá ið máttur hans bilar |
| Hósdagur 6. | **Mark 11,15-26** // Og tá ið tit standa og halda bøn, tá fyrigevið |
| Fríggjadagur 7. | **Luk 11,1-13** // Biðið, og tykkum skal verða givið |
| Leygardagur 8. | **Jak 5,13-20** // Hevur nakar av tykkum tað ringt, tá biði hann |
| Sunnudagur 9. | 5. s. e. páskir // **Jóh 16,23b-28** |
| Mánadagur 10. | **Áps 4,1-12** // Tá segði Pætur við teir, fyltur av heilagum anda |
| Týsdagur 11. | **Áps 4,13-22** // Vit kunnu ikki annað enn tala |
| Mikudagur 12. | **Áps 4,23-37** // Tey fyltust øll av heilagum anda |
| Hósdagur 13. | Kristi himmalsferðardagur // **Mark 16,14-20** |
| Fríggjadagur 14. | **Áps 8,1-13** // Og har varð stór gleði í teirri bygdini |
| Leygardagur 15. | **Áps 8,14-25** // Teir fóru oman hagar og bóðu fyri teimum |
| Sunnudagur 16. | 6. s. e. páskir // **Jóh 15,26-16,4** |
| Mánadagur 17. | **Jes 44,1-5** // Eg úthelli anda mín yvir ætt tína |
| Týsdagur 18. | **Ez 36,22-32** // Anda mín leggi eg tykkum í bróst |
| Mikudagur 19. | **Áps 2,14-24** // // Ikki eru hesir menn druknir |
| Hósdagur 20. | **Áps 2,25-39** // Tit skulu fáa gávu heilaga andans |
| Fríggjadagur 21. | **2 Kor 3,1-18** // Andin lívgar |
| Leygardagur 22. | **Kol 1,3-11** // Fyltir við kunnleika um vilja hansara |
| Sunnudagur 23. | Hvítusunnudagur // **Jóh 14,22-31** |
| Mánadagur 24. | 2. hvítusunnudagur // **Jóh 3,16-21** |
| Týsdagur 25. | **Præd 11,1-8** // Tú veitst ikki, hvønn veg vindurin fer |
| Mikudagur 26. | **Róm 5,1-11** // Kærleiki Guds er úthendur |
| Hósdagur 27. | **Róm 6,1-11** // Livandi fyri Gudi í Kristi Jesusi. |
| Fríggjadagur 28. | **Róm 6,12-23** // Latið tí ikki syndina ráða |
| Leygardagur 29. | **Ef 4,1-16** // Varðveita einleika andans |
| Sunnudagur 30. | Trinitatis sunnudagur // **Jóh 3,1-15** |
| Mánadagur 31. | **5 Mós 15,1-11** // Í roynd um man eingin fátækur fara at vera hjá tær |

# Hvítusunna og Tríeindin

Hvítusunnan er eins og páskirnar eitt vallarahátíðarhald hjá jødum, sum í kristindóminum fær nýtt innihald. Í Gamla Testamenti verður hátíðin antin kallað akurskurðarveitsla ella vikuveitsla, sum boðar frá, at akurskurðurin er lokin. Hátíðin byrjar sjey vikur eftir páskir. Verða bæði fyrsti og síðsti dagur eftir gomlum siði taldir við, er hvítusunnudagur hálvtrýssinstjúgundi dagur, og danska orðið „pinse" stavar júst frá grikska orðinum fyri hálvtrýss, pentekoste. Vit nevna hátíðina hvítusunna.

Frásøgnin um ta fyrstu kristnu hvítusunnuna er í byrjanini av Ápostlasøguni. Her verður sagt frá, at Jesus áðrenn sína himmalsferð sýndi seg fyri lærusveinunum í fjøruti dagar eftir uppreisnina og álegði teimum, at teir skuldu verða verandi í Jerúsalem. „Jóhannes doypti við vatni, men tit skulu verða doyptir við heilagum anda ikki mangar dagar hereftir" (Áps 1,5) Tíggju dagar eftir hetta, á hvítusunnudegnum, vóru allir lærusveinarnir savnaðir innandura, tá ið teir upplivdu og sóu storm- og eldlíknandi fyribrigdi. Teir vórðu fyltir við Heilaga Andanum og fóru síðan at tala á fremmandum málum.

Fólk tyrptust saman, harímillum jødar úr fjarskotnum landspørtum, og hoyrdu hvør sær lærusveinarnar tala á teirra egna máli. Pætur steig fram og helt ta fyrstu kristnu prædikuna um hin krossfesta og upprisna, og síðan vórðu mong doypt í Jesu navni. Soleiðis gjørdist hvítusunnudagurin – sum vit ofta hoyra í dag – føðingardagur hjá kristnu kirkjuni.

Fyrsti sunnudagur eftir hvítusunnudag hevur fingið navnið tríeindarsunnudagur, og allir fylgjandi sunnudagar fram til advent verða taldir sum sunnudagar eftir tríeindina og bera boð um Gud sum tann, sum er Faðir, Sonur og Andi. Fyrsti persónur, sum í byrjanini av 200-talinum talar um Guds tríeind, er kirkjufaðirin Tertullian – hugtakið er sostatt ikki í Bíbliuni, men teir fornkirkjuligu gudfrøðingarnir vildu staðfesta, at Gud er ein, men orðber seg bæði sum faðir, sonur og andi.

Í Nýggja Testamenti eru nakrar fyriboðanir um tríeindarhugsanina. Matteusarevangeliie endar soleiðis við Jesu boðum um at doypa „í navni Faðirsins, Sonarins og Heilaga Andans", og Paulus apostul endar sítt Seinna Bræv til Korintmanna við hesi signing: „Harrans Jesu Krists náði og kærleiki Guds og samfelag Heilaga Andans veri við tykkum øllum!"

 STUÐLA SAT 7 Á S. 28



# JUNI

| | |
|---|---|
| Týsdagur 1. | **5 Mós 24,14-22** // Minst til, at tú vart sjálvur trælur |
| Mikudagur 2. | **Job 29,7-17** // Eg bjargaði arminganum |
| Hósdagur 3. | **Jer 5,23-31** // Rættin hjá fátækum fremja teir ikki |
| Fríggjadagur 4. | **Ám 5,10-17** // Tit traðka hin vesæla niður |
| Leygardagur 5. | **Ám 6,1-8** // Tá tagnar gleimur teirra, sum reika um og einki gera |
| Sunnudagur 6. | 1. s. e. trinitatis // **Luk 16,19-31** |
| Mánadagur 7. | **Jes 55,1-11** // Fólk, tú ikki kennir |
| Týsdagur 8. | **Áps 13,26-41** // Orðið um hesa frelsu |
| Mikudagur 9. | **Áps 13,42-52** // Tá venda vit okkum til heidningarnar |
| Hósdagur 10. | **Áps 18,1-11** // Frá hesi stund fari eg til heidningarnar |
| Fríggjadagur 11. | **Róm 3,1-9** // Hvønn fyrimun hevur tá Jødin? |
| Leygardagur 12. | **Gal 2,1-10** // Vit skuldu fara til heidningarnar |
| Sunnudagur 13. | 2. s. e. trinitatis // **Luk 14,16-24** |
| Mánadagur 14. | **Sl 80,1-20** // Ísraels hirði! tú gevi ljóð |
| Týsdagur 15. | **Jes 40,9-17** // Lombini tekur hann upp í føvningin |
| Mikudagur 16. | **Jóh 17,9-23** // Eingin teirra glataðist |
| Hósdagur 17. | **Jóh 21,15-19** // Røkta lomb míni |
| Fríggjadagur 18. | **1 Pæt 2,18-25** // Nú hava tit vent við |
| Leygardagur 19. | **2 Pæt 3,8-18** // Hann vil ikki, at nakar skal glatast |
| Sunnudagur 20. | 3. s. e. trinitatis // **Luk 15,1-10** |
| Mánadagur 21. | **1 Sám 8,1-9** // Teir tóku við mutri |
| Týsdagur 22. | **Sl 96,1-13** // Hann kemur jarðarríkið at døma |
| Mikudagur 23. | **Róm 2,1-11** // Tú, sum dømir |
| Hósdagur 24. | **1 Kor 3,16-4,5** // Tann, sum dømir meg |
| Fríggjadagur 25. | **1 Kor 6,1-8** // Vita tit ikki, at vit eiga at døma einglar |
| Leygardagur 26. | **Opb 20,11-15** // Bøkur vórðu latnar upp |
| Sunnudagur 27. | 4. s. e. trinitatis // **Luk 6,36-42** |
| Mánadagur 28. | **Jer 1,4-10** // Sí, nu leggi eg orð míni í munn tín |
| Týsdagur 29. | **Matt 19,23-30** // Vit hava yvirgivið alt og fylgt tær |
| Mikudagur 30. | **Jóh 21,1-14** // Eg fari út at fiska |

# JULI

| | | |
|---|---|---|
| Hósdagur 1. | **Áps 3,12-26** // Vendið um |
| Fríggjadagur 2. | **Áps 11,1-18** // Pætur kom niðan til Jerúsalem |
| Leygardagur 3. | **Áps 15,7-21** // Gud ráddi av tykkara millum |
| Sunnudagur 4. | 5. s. e. trinitatis // **Luk 5,1-11** |
| Mánadagur 5. | **1 Mós 9,1-11** // Ongantíð skal flóð koma aftur til at oyða jørðina |
| Týsdagur 6. | **2 Mós 20,7-17** // Eg Harrin, Gud tín, eri vandlátur Gud |
| Mikudagur 7. | **3 Mós 24,17-22** // Eyga fyri eyga, tonn fyri tonn |
| Hósdagur 8. | **Hós 6,1-6** // Til kærleika er mín hugur, ikki til sláturofra |
| Fríggjadagur 9. | **Hebr 10,1-10** // Sí, eg eri komin til at gera vilja tín |
| Leygardagur 10. | **1 Jóh 3,11-24** // Hvør tann, sum hatar bróður sín |
| Sunnudagur 11. | 6. s. e. trinitatis // **Matt 5,20-26** |
| Mánadagur 12. | **2 Mós 21,37-22,8** // Hann skal verða seldur sum endurgjald |
| Týsdagur 13. | **Jer 31,7-14** // Eg broyti sorg teirra í gleði |
| Mikudagur 14. | **Ez 33,12-20** // Eingin av syndum teirra skal verða tilroknað |
| Hósdagur 15. | **Ef 2,11-22** // Hann er friður okkara |
| Fríggjadagur 16. | **Kol 2,6-15** // Liva í honum |
| Leygardagur 17. | **1 Tim 1,12-17** // Mær varð miskunnað |
| Sunnudagur 18. | 7. s. e. trinitatis // **Luk 19,1-10** |
| Mánadagur 19. | **Jer 14,11-16** // Profetarnir profetera lygnir í navni mínum |
| Týsdagur 20. | **2 Tim 3,1-9** // Torførar tíðir |
| Mikudagur 21. | **Ják 1,19-27** // Gera eftir orðinum |
| Hósdagur 22. | **Ják 3,5b-12** // Kann tá eitt fikutræ geva av sær oljuber |
| Fríggjadagur 23. | **1 Jóh 2,18-29** // Hvør tann, sum noktar soni |
| Leygardagur 24. | **Opb 13,1-10** // Og tað læt upp munn sín |
| Sunnudagur 25. | 8. s. e. trinitatis // **Matt 7,15-21** |
| Mánadagur 26. | **2 Mós 34,1-9** // Harrin, Harrin, miskunnsamur og náðigur Gud |
| Týsdagur 27. | **Sl 6,1-11** // Náða meg, Harri |
| Mikudagur 28. | **Præd 2,1-11** // Eg útinti stórverk |
| Hósdagur 29. | **Jer 31,31-34** // Eg man fyrigeva misgerð teirra |
| Fríggjadagur 30. | **Luk 16,10-17** // Gudi og mammon |
| Leygardagur 31. | **Ef 5,8-20** // Livið sum børn ljósins |

## Frá Bíbliufelagnum:
# Bíbliuútgávur í bókabúðunum



## Bíblia – Ættarbíblia

við stórari skrift

Stødd 21,5 x 30,4 cm.
Við gullskurði.
1211 síður
Myndprýtt hevur hennara hátign Margreta drotning II.



600,-




245,-

## Bíblia

Stødd 12,5 x 19,5 cm.
1211 síður
Kápa: Edward Fuglø

## Bíblia í svørtum

leðurlíki við gullskurði
Stødd 12,5 x 19,5 cm.
1211 síður




345,-

## Nýggja testamenti sum ljóðbók

300,-

Sí annars á www.biblia.fo



# AUGUST

| | |
|---|---|
| Sunnudagur 1. | 9. s. e. trinitatis // **Luk 16,1-9** |
| Mánadagur 2. | **1 Kong 9,4-9** // Hetta hús skal avtoftast |
| Týsdagur 3. | **Sl 24,1-10** // Hevjið tykkara høvur, borglið |
| Mikudagur 4. | **Sl 42,1-12** // Eg gekk til Guds hús |
| Hósdagur 5. | **Jes 56,3-8** // Hús mítt skal verða kallað bønhús |
| Fríggjadagur 6. | **Jer 7,1-15** // Halda tit tá hetta húsið vera ránsmannabøli? |
| Leygardagur 7. | **Jer 26,1-11** // Gakk fram í forgarð hús Harrans |
| Sunnudagur 8. | 10. s. e. trinitatis // **Luk 19,14-48** |
| Mánadagur 9. | **Ezra 9,1-9** // Misgerðir várar eru vaksnar okkum yvir høvdið |
| Týsdagur 10. | **Ezra 9,10-15** // Vit liggja í sekt vári frammi fyri ásjón tíni |
| Mikudagur 11. | **Sl 38,1-23** // Tí mína synd eg sanni |
| Hósdagur 12. | **Dán 6,7-18** // Dánjal bað og ákallaði Gud sín |
| Fríggjadagur 13. | **Dán 6,19-29** // Hann er hin livandi Gud |
| Leygardagur 14. | **Róm 2,17-29** // Lærir tú ikki teg sjálvan? |
| Sunnudagur 15. | 11. s. e. trinitatis // **Luk 18,9-14** |
| Mánadagur 16. | **Sl 36,1-13** // Hvør dýrmæt er, Gud, tín miskunn |
| Týsdagur 17. | **Sl 116,1-19** // Tú sál míni bjargar |
| Mikudagur 18. | **Jes 29,17-24** // Á tí degi skulu deyv hoyra |
| Hósdagur 19. | **Jes 42,10-17** // Syngið Harranum nýggjan song |
| Fríggjadagur 20. | **Jes 42,18-43,1** // Hvør av tykkum lurtar |
| Leygardagur 21. | **Áps 9,1-19** // Fell tað eins og skøl fra eygum hansara |
| Sunnudagur 22. | 12. s. e. trinitatis // **Mark 7,31-37** |
| Mánadagur 23. | **3 Mós 19,11-18** // Tú skalt elska næsta tín |
| Týsdagur 24. | **Jós 22,1-6** // Elski Harran, Gud tykkara |
| Mikudagur 25. | **2 Kong 17,24-41** // Teir fylgja fornum siði |
| Hósdagur 26. | **Áps 16,22-34** // Han vaskaði sár teirra |
| Fríggjadagur 27. | **Gal 5,13-26** // Tú skalt elska næsta tín sum sjálvan teg |
| Leygardagur 28. | **1 Pæt 1,3-12** // Um hesa frelsu hava profetar grundað og rannsakað |
| Sunnudagur 29. | 13. s. e. trinitatis // **Luk 10,23-37** |
| Mánadagur 30. | **3 Mós 13,1-8** // Sjúkur av líktrá |
| Týsdagur 31. | **3 Mós 13,38-46** // Siga hann óreinan |

# SEPTEMBER

| | |
|---|---|
| Mikudagur 1. | **Hebr 11,1-12** // Treyst í tí, sum vónað verður |
| Hósdagur 2. | **Hebr 11,13-22** // Við trúgv ofraði Ábraham Ísak |
| Fríggjadagur 3. | **Hebr 11,23-31** // Við trúgv gingu tey gjøgnum Reyðahavið |
| Leygardagur 4. | **Hebr 11,32-40** // Við trúgv vunnu sigur á kongaríkjum |
| Sunnudagur 5. | 14. s. e. trinitatis // **Luk 17,11-19** |
| Mánadagur 6. | **1 Kong 10,1-13** // Vitrari og ríkari |
| Týsdagur 7. | **Sl 104,24-35** // Tey verða mett av góðum |
| Mikudagur 8. | **Fil 4,4-9** // Verið ikki stúrnir fyri nøkrum |
| Hósdagur 9. | **1 Tim 6,1-10** // Føði og klæði |
| Fríggjadagur 10. | **Hebr 13,1-8** // Eg skal als ikki sleppa tær |
| Leygardagur 11. | **Ják 4,1-10** // Eyðmjúkum veitir hann náði |
| Sunnudagur 12. | 15. s. e. trinitatis // **Matt 6,24-34** |
| Mánadagur 13. | **1 Kong 17,7-24** // Sí, sonur tín livir |
| Týsdagur 14. | **2 Kong 4,8-24** // Leið hann heim til móður sína |
| Mikudagur 15. | **2 Kong 4,25-37** // Leggja stav mín yvir andlit drongsins |
| Hósdagur 16. | **1 Kor 15,29-41** // Hvussu rísa hini deyðu upp? |
| Fríggjadagur 17. | **1 Kor 15,42-58** // Deyðin er uppslúkaður í sigur |
| Leygardagur 18. | **Opb 21,9-21** // Eg skal vísa tær brúðrina |
| Sunnudagur 19. | 16. s. e. trinitatis // **Luk 7,11-17** |
| Mánadagur 20. | **2 Mós 31,13-18** // Á sjeynda degi hvíldi hann |
| Týsdagur 21. | **Neh 13,15-22** // Tit vanhalga hvíludagin |
| Mikudagur 22. | **Orðt 25,1-8** // Stilla teg ikki á stórmanna stað |
| Hósdagur 23. | **Es 20,11-17** // Eisini hvíludagar mínar sum tekin |
| Fríggjadagur 24. | **Mark 2,23-3,6** // Tí er menniskjusonurin eisini hvíludagsins harri |
| Leygardagur 25. | **Ják 2,1-13** // Set tú teg her á henda góða sessin |
| Sunnudagur 26. | 17. s. e. trinitatis // **Luk 14,1-11** |
| Mánadagur 27. | **5 Mós 30,1-10** // Snúgv tær aftur til Harrans, Guds tíns |
| Týsdagur 28. | **5 Mós 30,11-20** // Vel nú lívið |
| Mikudagur 29. | **Sl 110,1-7** // Set teg við høgru hond mína |
| Hósdagur 30. | **Róm 13,8-14** // Tann, sum elskar næsta sín, hevur uppfylt lógina |



# OKTOBER

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadagur | 1. | **1 Kor 13,1-13** // Kærleikin fellur onga tíð burtur |
| Leygardagur | 2. | **2 Jóh 1-13** // Vit skulu elska hvør annan |
| Sunnudagur | 3. | 18. s. e. trinitatis // **Matt 22,34-46** |
| Mánadagur | 4. | **3 Mós 16,1-10** // Áron skal veita sær og húsi sínum sáttargerð |
| Týsdagur | 5. | **3 Mós 16,11-22** // Havurin skal tá bera á sær allar misgerðir teirra út á óbygt land |
| Mikudagur | 6. | **3 Mós 16,23-34** // Skal verða veitt tykkum sáttargerð |
| Hósdagur | 7. | **Mika 7,11-20** // Hvør gud er sum tú |
| Fríggjadagur | 8. | **Kol 3,12-17** // Eins og Kristus fyrigav tykkum |
| Leygardagur | 9. | **Hebr 8,1-13** // Eg skal ikki longur minnast syndir teirra |
| Sunnudagur | 10. | 19. s. e. trinitatis // **Mark 2,1-12** |
| Mánadagur | 11. | **Hós 2,18-25** // Eg skal siga við „Ikki-mítt-fólk“: „Tú ert fólk mítt;“: |
| Týsdagur | 12. | **Róm 9,22-33** // Teir gingu seg á snávingarsteinin |
| Mikudagur | 13. | **Ef 6,10-20** // Latið tykkum í øll herklæði Guds |
| Hósdagur | 14. | **Opb 3,1-6** // Tann, sum sigrar |
| Fríggjadagur | 15. | **Opb 7,9-17** // Hvørji eru tey, sum skrýdd eru í hvítu klæðunum |
| Leygardagur | 16. | **Opb 19,1-10** // Rættferðarverk teirra heilagu |
| Sunnudagur | 17. | 20. s. e. trinitatis // **Matt 22,1-14** |
| Mánadagur | 18. | **2 Sám 18,9-18** // Eg havi ongan son |
| Týsdagur | 19. | **2 Sám 18,19-32** // Veit hinum unga Absaloni væl við? |
| Mikudagur | 20. | **2 Sám 19,1-9** // Dávid græt |
| Hósdagur | 21. | **Áps 5,12-32** // Gud fedra vára hevur reist upp Jesus |
| Fríggjadagur | 22. | **Áps 5,33-42** // Um tað er av Gudi, tá eru tit ikki mentir at gera tað til einkis |
| Leygardagur | 23. | **Ják 1,2-18** // Hann biði í trúgv og ikki ivandi |
| Sunnudagur | 24. | 21. s. e. trinitatis // **Joh 4,46-53** |
| Mánadagur | 25. | **Sl 32,1-11** // Sælur er hann, hvørs misbrot er fyrigivið |
| Týsdagur | 26. | **Jes 43,18-28** // Eg minnist ikki syndir tínar |
| Mikudagur | 27. | **2 Kor 2,1-11** // Tí, sum tit fyrigeva nakað, honum fyri gevi eg við |
| Hósdagur | 28. | **Ef 2,1-10** // Reist okkum upp saman við honum |
| Fríggjadagur | 29. | **Ef 4,17-32** // So at tit fyrigeva hvør øðrum |
| Leygardagur | 30. | **Ják 1,19-27** // Leggið tí av allan óreinskap |
| Sunnudagur | 31. | 22. s. e. trinitatis // **Matt 18,21-35** |


STUÐLA SAT 7 Á S. 28

# NOVEMBER

| | |
|---|---|
| Mánadagur 1. | **Sl 37,1-11** // Spaklyntir fáa landið í ogn |
| Týsdagur 2. | **Sl 51,9-21** // Brotið og sundurfarið hjarta |
| Mikudagur 3. | **Jes 57,14-20** // Nú vil eg grøða hann |
| Hósdagur 4. | **Luk 6,20-26** // Sælir eru tit, fátækir |
| Fríggjadagur 5. | **1 Kor 4,8-16** // Vit eru fávitskutir fyri Krists skuld |
| Leygardagur 6. | **1 Pæt 3,8-17** // Um tit eisini skuldu líðið fyri rættvísi skuld, tá eru tit sælir |
| Sunnudagur 7. | Allhalgannasunnudagur // **Matt 5,1-12** |
| Mánadagur 8. | **3 Mós 15,19-30** // Hon skal vera órein |
| Týsdagur 9. | **Job 19,21-29** // Eg veit, at loysnari mín livir |
| Mikudagur 10. | **Sl 31,1-14** // Ver mær miskunnsamur, Harri, tí eg eri staddur í neyð |
| Hósdagur 11. | **Sl 31,15-25** // Tú hoyrdi mína bønligu reyst |
| Fríggjadagur 12. | **Sl 46,1-12** // Jákups Gud er vár fasta borg |
| Leygardagur 13. | **Áps 9,36-42** // Tabita, reis teg upp |
| Sunnudagur14. | 24. s. e. trinitatis // **Matt 9,18-26** |
| Mánadagur 15. | **Sl 94,1-11** // Reis teg, jarðarríkis dómari |
| Týsdagur 16. | **Sl 94,12-23** // Rætturin aftur til rættvísi vendir |
| Mikudagur 17. | **Jes 58,1-9** // Húsa neyðstøddum og heimleysum |
| Hósdagur 18. | **Dán 12,1-4** // Hinir vitru skulu lýsa |
| Fríggjadagur 19. | **2 Tess 2,1-12** // Latið ongan villa tykkum |
| Leygardagur 20. | **Hebr 13,1-6** // Minnist til teirra, sum fangar eru |
| Sunnudagur 21. | Síðsti sunnudagur í kirkjuárinum // **Matt 25,31-46** |
| Mánadagur 22. | **2 Kong 5,1-8** // Men maðurin var líktráur |
| Týsdagur 23. | **2 Kong 5,9-16** // Hold hansara aftur eins og holdið á lítlum barni |
| Mikudagur 24. | **2 Kong 5,17-27** // Far tú í friði |
| Hósdagur 25. | **Jes 11,1-10** // Andi Harrans skal hvíla yvir honum |
| Fríggjadagur 26. | **Jes 35,1-10** // Tá skulu eygu hinna blindu latast upp |
| Leygardagur 27. | **Jes 61,1-9** // Harrin hevur salvað meg |



## Stuðla kristnu sjónvarpsstøðini Sat-7

Sat-7 er ein sjónvarpsstøð, sum sendir kristiligar og almannagagnligar sendingar á satelitti, ið sæst um alt Miðeystur og Norðurafrika. Sat-7 eru fleiri sendistøðir og sent verður á trimum málum samstundis, arabiskum, turkiskum og persiskum (iranskum), alt døgnið, umframt eina serliga barnarás og eina skúlarás.

Endamáli hjá Sat-7 er, at síggja eina vaksandi Kirkju í Mið-eysturi og Norðurafrika, ið er trygg í Kristnari trúgv og vitniburði, tænandi felagskapinum, og at gera gott fyri samfelag og mentan.

Hetta verður gjørt við at veita kirkjum og kristnum í Mið-eysturi og Norðurafrika, møguleika fyri at vitna um Jesus Kristus, ígjøgnum innblásandi, kunnandi og útbúgvandi sjónvarpstænastur.

Ynskir tú at stuðla Sat-7, kanst tú flyta gávu á konto 6460-382.873.7

**KEYP Á NETINUM!**

Føroyskar og útlendskar bøkur, kort og annað kristiligt tilfar kann keypast á nethandlinum hjá Heimamissiónsforlagnum.

Far inn á www.manna.fo og hygg nærri.

Heimamissiónsforlagið

**Bíbliufelagið**

Bíbliufelagið hevur heimasíðuna

www.biblia.fo

Trýst á „Les Bíbliuna“. Her kanst tú lesa bíbliuna og fáa hana upplisnað við at trýsta á "Lurta" ovarlaga á síðuni. Tað ber eisini til at goyma upplesturin sum fílu við at trýsta á Lurta

So kanst tú lurta á tíni
teldu ella fartelefon

www.biblia.fo

## STÝRISLIMIRNIR Í FØROYSKA BÍBLIUFELAGNUM

**Jógvan Fríðriksson**, forseti í stýrinum, biskupur, fólkakirkjan
**Bergur D. Joensen**, formaður í stýrinum, sóknarprestur, fólkakirkjan
**Dánial á Dul Jacobsen**, næstformaður í stýrinum, hvítusunnusamkomurnar
**Uni Næs**, stýrislimur, dómpróstur, fólkakirkjan
**Pauli Høj**, stýrislimur, pastorur í Kelduni, karismatisku kirkjurnar
**Ole Jakob Nielsen**, stýrislimur, listamaður, Katólska kirkjan
**Jenny Lydersen**, stýrislimur, undirvísingarleiðari á Mentamálaráðnum, fólkakirkjan
**Andrias Magnussen**, stýrislimur, aðalskrivari, Kirkjuliga Heimamissiónin
**Atli Rasmussen**, stýrislimur, Kirkjuliga Missiónsfelagið, Risk & Compliance leiðari í Norðoya Sparikassa
**Tummas Lauritsen**, stýrislimur (valdur á aðalfundi 2018), faklærari í Tekniska skúla
**Hallgerð Akurstein**, stýrislimur (vald á áðalfundi 2018), lærari
**Gunnar K. Nattestad**, aðalskrivari hjá Bíbliufelagnum
**Jóngerð MIkkelsen,** forlagsleiðari

## ENDAMÁL

**Endamálið hjá Føroyska Bíbliufelagnum er:**

1. at geva út Bíbliuna og partar av henni á føroyskum máli og at fáa Bíbliuna út
2. at skipa fyri at týða Bíbliuna ella partar av henni, at endurskoða verandi bíbliuútgávur, at geva út bíbilsku skriftirnar í øðrum útgávum enn teimum løggildu og annað viðkomandi tilfar
3. at fremja bíbliunýtslu, bíbliulesnað og bíbliukunnleika
4. at hava innsavningar og forlagsvirksemi
5. at umsita sambandið við útlendsk bíbliufeløg
6. at stuðla altjóða bíbliuarbeiði

# STYTTINGAR

| | |
|---|---|
| Ám | Ámos |
| Áps | Ápostlasøgan |
| Dán | Dánjal |
| Dóm | Dómarabókin |
| Ef | Efesusbrævið |
| Est | Esterarbók |
| Ez | Ezekiel |
| Ezra | Ezra |
| Fil | Filippibrævið |
| Filem | Filemonsbrævið |
| Gal | Galatarbrævið |
| Hab | Habakkuk. |
| Hagg | Haggai |
| Harm | Harmljóðini |
| Hás | Hásongurin |
| Hebr | Hebrearabrævið |
| Hos | Hosea |
| Ják | Jákupsbrævið |
| Jer | Jeremia |
| Jes | Jesaja |
| Job | Jobsbók |
| Jóel | Jóel |
| Jóh | Evangeliið eftir Jóhannes |
| Jón | Jónas |
| 1 Jóh | Fyrsta bræv Jóhannesar |
| 2 Jóh | Annað bræv Jóhannesar |
| 3 Jóh | Triðja bræv Jóhannesar |
| Jós | Jósva |
| Jud | Judasarbrævið |
| Kol | Kolossubrævið |
| 1 Kong. | Fyrra Kongabók |
| 2 Kong | Seinna Kongabók |
| 1 Kor | Fyrra Korintbrævið |
| 2 Kor | Seinna Korintbrævið |
| 1 Krýn | Fyrra Krýnikubók |
| 2 Krýn | Seinna Krýnikubók |
| Luk | Evangeliið eftir Lukas |
| Mal | Malaki |
| Mark | Evangeliið eftir Markus |
| Matt | Evangeliið eftir Matteus |
| Mika | Mika |
| 1 Mós | Fyrsta Mósebók |
| 2 Mós | Onnur Mósebók |
| 3 Mós | Triðja Mósebók |
| 4 Mós | Fjórða Mósebók |
| 5 Mós | Fimta Mósebók |
| Nah | Nahum |
| Óbad | Óbadia |
| Opb | Opinberingin |
| Orðt | Orðatøk Sálomons |
| 1 Pæt | Fyrra Pætursbræv |
| 2 Pæt | Seinna Pætursbræv |
| Præd | Prædikarin |
| Róm | Rómverjabrævið |
| Rut | Rutarbók |
| 1 Sám | Fyrra Sámuelsbók |
| 2 Sám | Seinna Sámuelsbók. |
| Sef | Sefanja |
| Sl | Sálmarnir |
| 1 Tess | Fyrra Tessalónikubræv |
| 2 Tess | Seinna Tessalónikubræv |
| 1 Tim | Fyrra Timoteusarbræv |
| 2 Tim | Seinna Timoteusarbræv |
| Titus | Titusarbræv |
| Zak | Zakarja |

# ESKJA TIL BÍBLIUVERS




Eitt bíbliuvers gevur høvi til umhugsan og kann eggja til bíbliulesna. Bíbliufelagið hevur latið gjørt eskjur til bíbliuvers. Eskjan hevur ein vakran reyðan lit og kann standa ella hanga í forkirkjuni og í missións- og samkomuhúsum o.a. Á eskjuni er teksturin: „Fá tær eitt bíbliuvers.“ Í hvørjum bunti av bíbliuversum eru umleið 250 kort við ymiskum bíbliuversum. Eskja og bíbliuvers fáast til keyps frá Bíbliufelagnum.




Bíbliu-Appin er til iPhone, iPad, iPod touch og Android. Les meira á www.biblia.fo

Bíbliufelagið hevur latið gjørt Bíbliu-App til Dahl/Viderø Bíbliuna. Við appini kanst tú lesa alla Bíbliuna á fartelefonini/teldlinum, leita í Bíbliuni, fáa mannakorn til hvønn dag, deila á facebook og mangt annað.

**Vitja heimasíðuna hjá Bíbliufelagnum**
**Á heimasíðuni ber til at lesa og**
**hoyra upplestur (teldutala) av Bíbliuni og greinum.**

**Les meira á: www.biblia.fo**
**Føroyska Bíbliufelagið**
**Giljavegur 32**
**FO-360 Sandavágur**
**T-postur: biblia@biblia.fo**